

# Statoil byggir heimsins fyrstu flótandi vindmylnulund í Skotlandi

**Jan Müller**

03.11.2015 - 15:50

Oljan.fo

Norska Statoil hevur nú givið grønt ljós fyri at byggja heimsins fyrstu flótandi vindmylnulund í Norðsjónum, út fyri Peterhead í Skotlandi. Hon fer at kunna framleiða 30 megawatt í Buchan Deep økinum 25 kilometrar uttan fyri Peterhead. Har fer hon so at framleiða vindorku til bretska meginlandið. Talan er um eitt sokallað pilotprojekt, sum fer at veita streym til 20.000 húsarhald. Framleiðslan skal byrja í 2017. Ìløgan, sum Statoil hevur játtað,

er uppá 2 mia. kr. Síðani Statoil fór undir at gera fyrstu royndirnar við havvindorku, hevur felagið megnað at minka um kostnaðarútreiðslurnar fyri MW uppá 60-70%.

”Vit í Statoil eru errin av at kunna menna heimsins fyrstu flótandi vindmylnulund. Endamálið við Hywind lundini er at vísa, at lønandi flótandi vindmylnulundir fara at gerast veruleiki í næstu framtíð. Hetta fer at hava týdning fyri altjóða vindmylnuorku og stuðla upp undir ynskini hjá Statoil at kunna fáa lønandi vøkstur innan varandi orkukeldur,” sigur Irene Rummelhoff, konsernstjóri hjá Statoil fyri nýggjum orkuloysnum.

Lundin fer at dekka eitt øki uppá 4 ferkilometrar á einum havdýpi uppá 95 til 120 metrar. Meðal vindferðin í hesum partinum av Norðsjónum er 10 metrar í sekundið.

”Vit eru fegnir um at kunna menna hetta projektið í Skotlandi, í einum øki við stórum vindressursum og einum veitingarídnaði við nógvum royndum frá olju og gassi. Gjøgnum ídnaðin og stuðulskipanir taka Stórabretland og Skotland stig til at vera fremst innan menning av havvindorku sum ein kappingarfør nýggj orkukelda,” sigur Rummelhoff.

Eisini skotski vara fyrstiráðharrin í stjórnini, John Swinney, er fegin og bjóðar Statoil vælkomnum. ”Hywind er eitt sera áhugavert projekt, bæði tá talan er um framleiðslu av elorku og tøkniligari innovatión, nýhugsan. At Statoil hevur valt Skotland er ein staðfesting av, at vit eru á rættari kós við teimum røttu fólkunum og rætta viljanum. Hervið fer Skotland at ganga á odda á hesum økinum.”

Eisini bretski ráðharrin fyri orku og veðurlagsbroytingar, Amber Rudd er ovurfegin um avgerðina hjá Statoil. ”Hetta eru ótrúlig tíðindi fyri bæði Skotland og alt Stórabretland. Avgerðin vísir, at Bretland er staðið at menna nýggjar varandi orkukeldur við eini vinnnu, sum verður dugnaligari og sterkari fyri hvønn dag.”

Statoil samstarvar við fleiri skotskar veitarar og partnarar í sambandi við verkætlanina, sum fer at skapa nýggj arbeiðspláss fyri ídnaðin í Skotlandi og í øðrum londum. Raksturin av vindmylnulundini fer fram í Peterhead og fer so eisini at arbeiða saman við skrivstovuni hjá Statoil í Aberdeen.

Hywind er nýggj havvindtøkni, sum er ment av Statoil. Hon er testað og roynd í seks ár við eini prototypu uttan fyri Karmøy. Hon er kappingarfør við aðrar skipanir innan fyri havvindorku.

Tað er nýggja deildin í Statoil, ”Nýggjar orkuloysnir”, sum fer at hava ábyrgdina av projektinum, ið er ein staðfesting av ynskinum og málinum hjá Statoil at menna varandi orkukeldur við síðuna av sínum olju- og gassvirksemi. Hywind er fyrsta íløgan av sínum slag, sum Statoil ger, síðani nýggja deildin varð stovnað. Hon fer at vera undir konsernleiðsluni í felagnum.

Havvindur er longu við at fáa fótafesti í Europa við einum kapasiteti uppá 10 GW. Men møguleiki er fyri at økja hetta til 100 GW innan 2030. Við botnfestum turbinum er havvindframleiðslan uppá tað mesta á havdýpi uppá 20 til 50 metrar.

Statoil er vorðin ein týðandi partnari hjá Bretlandi fyri at tryggja orkuveitingina. Statoil letur longu týðandi nøgdir av gassi til Bretlands, umleið 20% av øllum gassi. Felagið er eisini sera virkið á bretska landgrunninum, har tað leggur til rættis útbygging av m.a. oljufeltinum Mariner.

Statoil hevur longu royndir frá vindorkumenning í Bretlandi. Tað var fyristøðufelag, tá havvindlundin Sheringham Shoal varð bygd út fyri Norfolk í 2012. Samanlagt fer parturin hjá Statoil at framleiða elorku í Bretlandi at nøkta tørvin hjá 4,5 mill. bretskum húsarhaldum í framtíðini.

Kelda: [www.statoil.com](http://www.statoil.com)






Hywind worldwide
by Statoil ASA




Peterhead
Hywind Scotland Pilot Park
Aberdeen
North Sea
Edinburgh






John Swinney, vara fyrstiráðharri í Skotlandi


Amber Rudd, bretski orkuráðharrin


rene Rummelhoff, konsernstjóri hjá Statoil fyri nýggjum orkuloysnum




Hywind Karmøy Rogaland Norway
by Statoil ASA


Hywind Scotland
The world's first floating wind farm